Mikkjal Gaard Hansen velur 5 tey bestu løgini

# Tónleikur er mítt battarí



5 teir bestu

**Mikkjal Gaard Hansen er oddamaðurin í málmsbólkinum Sic, sum hesa vikuna hevur kollvelt føroyska fløguútgávu. Myrka røddin er eyðkend, men hvar kemur íblásturin frá. Vit hava biðið Mikkjal um at velja 5 tey bestu løgini í heiminum.**

**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

Mikkjal Gaard Hansen er best kendur sum orkumikli oddamaðurin í tungmálmsbólkinum Sic. Hansara rámandi og inniliga rødd, telist millum tær bestu og mest serstøku í Føroyum. Hetta upplivdi Føroyar enn einaferð, nú fløgan hjá bólkinum kom á marknaðin í vikuni.

Karl Anton Klein, sáli, segði um Mikkjal, at hann var tann feitastu rokkrávøran, ið vit eiga. Ein útsøgn, sum kann prógva seg sjálva nú fløgan Pandemonium er komin á marknaðin, og hevur stórar útflutningsmøguleikar í sær.

Líka síðan Mikkjal í bólkinum Krit byrjaði at gera vart við seg í umhvørvinum kring Margarinfabrikkina í Havn, hava hansara evnir verið greið, og brennandi áhugin fyri tónleikinum, hevur verið líka greiður.

Vit kenna Mikkjal úr Sic, myrka røddin er eyðkend, men hvar kemur íblásturin til tónleikin frá. Vit hava biðið Mikkjal um at siga okkum hvørji fimm løg, hann metur vera tey bestu í heiminum.

## Nógvur ymiskur tónleikur

–Tónleikur fyllur alt, eg gangi við mínum iPodi allan dagin, tónleikur er mítt battarí, sigur Mikkjal um týdningin, ið tónleikur hevur fyri hann. Talan er eisini um nógvan ymiskan tónleik.

Mikkjal viðgongur, at tað var ikki nøkur løtt uppgáva, at skula finna tey fimm bestu løgini.

– Har er so nógv at velja ímillum. Skuldi eg velja t.d okkurt hjá Black Sabbath, Alice In Chains ella kanska AC/DC, eg hevði stór problemir við at velja, sigur Mikkjal.

Tey fimm løgini, ið hann endaði við at velja vóru hesi:



## Meshuggah

New Millennium Cyanide Christ

– Tað sum mær dámar við Meshuggah er faktiskt rútmirnar, groovið. Meshuggah er fryktiliga ógvisligur bólkur. Vit í Sic eru nógv rútmiskt inspireraðir av Meshuggah. Eg havi onga ide um, hvat teksturin handlar um. Tí tá eg lurti eftir Meshuggah, so eru tað bara rútmirnar, sum eg lurti eftir.



## Godsmack

Sick of Life

– Mær dámar øgiliga væl tekstin í hesum lagnum. Ja, eg veit ikki, hann sigur tað so ræðuliga væl, tá man bara er troyttur av tí, tú veitst: Sick Of Life. Sjálvt lagið er eisini øgiliga gott. Ja. Samanumtikið dámar mær bara lagið.



## Hypocrisy

Disconnected Magnetic Corridors

– Hypocrisy er ein bólkur, sum eg hevði svert við at venja meg við. Ljóðið í akkurát hesum lagnum er ræðuliga stórt, og har er ein droymandi stemingur. Tekstirnar hjá teimum eru øgiliga depressivir. Mær dámar spesielt væl mátan sum sangarin brúkar røddina, onkuntíð skríggjar hann og onkuntíð ljóðar hann sum ein munkur.



## Pink Floyd

Comfortably Numb

– Uff, Comfortably Numb er ein deiligur sangur. Bara soloirnar, tær eru guff. Tá tú hevur sætt filmin The Wall, so fær teksturin enn meira meining. Aftur her dámar mær, mátan hann syngur. Hann er ikki verðsins besti sangari. Men hann dugir ræðuliga væl at útrykkja seg.



## Machine Head

Davidian

– Machine Head tekur meg aftur í fólkaskúlan. Tá eg fyrstu ferð hoyrdi Machine Head, so var tað næstan størri enn at hoyra Sepultura. Attitúdan er øgiliga viktig, har er so nógv attitúda. M.F. allan vegin í gjøgnum.